# Royking stinkar



Royking stinkar er heitið á herferð í móti royking millum næmingar í fólkaskúlunum, sum skúlarnir og heilsunevndin í Klaksvíkar kommunu arbeiða við

**Er heitið á øðrum átakinum, sum skúlarnir í Klaksvíkar kommunu í samstarvi við heilsunevnd býráðsins, hava arbeitt við í eina tíð. Átakið verður fríggjadagin og er onnur royndin at gera skúlarnar í býnum roykfríar**

ROYKING
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** Annað átakið ímóti royking hjá skúlunum og heilsunevndini í Klaksvíkar kommunu verður nú fríggjadagin í KFUM og K. Átakið byrjar klokkan tíggju og mangt og hvat spennandi er á skránni.

Tað fyrra átakið var sjálvan altjóða roykidagin tann 31.mai 2002, og hevði tað heitið Tað er ræst at roykja. Í sambandi við tað átakið varð gjørd ein kanning, sum vísti, at umleið annar hvør næmingur í framhaldsdeildini í skúlunum roykti.

Nú er so aftur gjørd ein kanning, sum verður avdúkað fríggjamorgunin. Formaðurin í heilsunevndini Rani Nolsøe sigur, at tey eru sera spent uppá úrslitið av kanningini, tí hon kemur at staðfesta, um hesi átakini gera nakran mun og um hetta er gongda leiðin til ein roykfrían skúla.

– Her skal sigast beinanvegin, at lærararnir eru undangongufólk í dag, tá tað kemur til royking. Tað eru alsamt færri og færri lærarar, sum roykja, og er tað serstakliga gott, heldur formaðurin í heilsunevndini í Klaksvíkar býráð.

### Spennandi skrá

Hóast hetta átakið ikki er á sjálvum Altjóða roykidegnum, so ivast Rani ikki í, at tað fer at eydnast væl.

– Hetta verður bara meira okkara egna átak av tí sama, sigur hann.

Sum sagt er ein spennandi skrá fyri dagin, og nógv verður gjørt burturúr. Nøkur ítróttarfólk, sum eru komin langt áleiðis innan teirra ítróttargrein koma at tosa við næmingarnar um royking.

Brandur Enni, sum hevur ætlanir um at koma langt innan tónleikin verður eisini har. Og hartil kemur sjónvarpslæknin Peter Qvortrup Geisling eisini at hava eitt innlegg.

Og at enda verður so úrslitið av roykikanningini millum næmingar í framhaldsdeildini lagt fram.

Rani Nolsøeer sera spentur, og hann fegnast um, at hesi átak hava verið, tí hann er ikki í iva um, at tað ger mun.

– Hetta hava skúlarnir arbeitt við í samstarvi við Klaksvíkar kommunu. Og býráðið hevur tikið undir við hesum átakunum og játtað pengar til tað, sigur Rani og leggur afturat, at onnur átøk eisini fara at koma.

# Í hernað móti handli við kvinnum

**Nú eru sameind kvinnufeløg farin í gongd við at varpa rættiligt ljós á støðuna viðvíkjandi handli av kvinnum í Føroyum. Hetta er serliga komið í lag eftir, at ein lýsing stóð í Dimmalætting, har tað beinleiðis varð lagt upp til mannfólk at keypa sær konur**



*Forkvinnan í Kvinnufelagssamskipan Føroya, Inga Ellingsgaard er ikki í iva um, at tá málið verður lagt fyri í tinginum, verður tað eitt 100 % samt ting, sum verður ímóti hesum ólevnaði, sum letur til at ganga fyri seg í Føroyum*
*Mynd: Jens K. Vang*

KVINNUHANDIL
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

– Tá avvarðandi myndugleikar siga seg ikki kunna gera nakað við eina lýsing, sum beinleiðis leggur upp til keyp av kvinnum, so veit eg ikki, hvør kann, sigur forkvinnan í Kvinnufelagssamskipan Føroya, Inga Ellingsgaard.

Hon frøist tó um, at tær báðar nývaldu løgtingskvinnurnar, Annita á Fríðriksmørk og Heidi Petersen, siga, at tær fara at taka málið upp á tingi, so skjótt, sum tað verður sett aftur.

Í lesarabrævi siga tær báðar, at tað undrar tær stórt, at varafútin sigur, at sølulýsingar við útlendskum kvinnum í føroyskum bløðum ikki eru ólógligar.

Tær báðar vísa á, at sjálvandi kann føroysk lóggáva ikki ráða í útlandinum, men samstundis vísa tær á grein 233 í revsilógini, har tað millum annað stendur, at hann sum á ein ella annan hátt leggur upp til ólevnað ella ósiðiligan livihátt, sum vekir almenna øsing, verður revsaður við fongsli í upp til eitt ár.

Tær báðar halda so avgjørt, at ein sølulýsing av útlendskum kvinnum kann koma undir hesa grein, tí tær meta tað vera ósigur og ótespiligur ólevnaður at bjóða gomlum dreingjum og giftum monnum í Føroyum at keypa sær kvinnur úr øðrum londum.

### Á røttum stað

Inga Ellingsgaard fegnast um, at løgtingskvinnurnar vilja taka hetta málið upp.

– So vita vit, at málið liggur á røttum stað, og eg ivist onga løtu í, at eitt einmælt samtykt ting tekur undir við, at hetta ikki sømir seg, sigur hon.

Men fyri tað heldur Inga ikki, at øll onnur bara skulu slappa av. Hon sigur, at øll eiga vit at vera á varðhaldi yvir fyri, at hetta gongur fyri seg í Føroyum.

– Hetta má ikki sleppa at festa røtur í okkara landi. Tað skal burtur, sigur Inga, sum leggur afturat, at tey hava ongi onnur haldgóð prógv enn lýsingina, og tí-skil er tað sera torført at vita, hvat tey skulu gera við málið.

Á fundi mánakvøldið í Mettustovu hittust Kvinnufelagssamskipan Føroya og Havnar Kvinnufelag, har tosað varð um, hvat eigur at verða gjørt og kann gerast í hesum málinum.

– Samstundis sum vit tosa um hetta málið, so kenna vit tað,sum tað er rættiliga lítið, sum vit fáa gjørt, men vit vilja arbeiða ímóti hesum. Eitt skriv fer at koma frá feløgunum, har áheitanir verða um at vera á varðhaldi yvir fyri hesum, og har ljós verður varpað á støðuna, sum hon er í dag, sigur Inga Ellingsgaard, sum at enda vísir á, at tað eru tríggir menn í fjølmiðlunum, sum hava tikið hetta málið upp. Heini Gaard á Dimmalætting, Sonni Smith á Rás 2 og Helgi Jacobsen í Útvarpi Føroya, og tað heldur hon er flott og gevur stórar ábendingar um, at tílíkt verður ikki góðtikið í Føroyum.

# Hvør fær »Månedens Buket« frá sjónvarpslæknanum

**Nógvir føroyingar eru í uppskoti til at fáa blómutyssi frá Peter Qvortrup Geisling, tá hesin kemur til Føroyar seinni í vikuni**

TÍÐINDASKRIV
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Umboðandi hundraðtals føroyingar, eru útvið 50 persónar í uppskoti at fáa »Månedens Buket« frá vælumtókta sjónvarpslæknanum.

Tað er komandi vikuskiftið, at læknin frá Læknin hevur orðið vitjar í Føroyum. Leygardagin kl. 15.00 í Norðurlandahúsinum og sunnukvøldið kl. 19.00 á Hotel Norð.

Frá IRIS, ið fyriskipar vitjanina, verður sagt, at sera nógvir og áhugaverdir persónar eru í uppskoti, og tað verður torført at taka dagar ímillum tey mongu góðu uppskotini, men ein skal so veljast út. Ein innstilling er gjørd, sum sjónvarpslæknin sjálvur sleppur at velja ímillum, eftir at hann sjálvsagt hevur gjøgnumgingið øll innkomin uppskot.

Avgjørt er, at ein persónur verður heiðraður í Norðurlandahúsinum, og ein á Hotel Norð á Viðareiði.

– Enn eru nøkur atgongumerkir eftir, ið fáast í Norðurlandahúsinum, á Kunningarstovuni í Havn og á Statoil-støðini í Klaksvík, siga fyrireikararnir.



*Tveir føroyingar fáa blómutyssi frá sjónvarpslæknanum komandi vikuskifti. Ein í Norðurlandahúsinum og ein á Hotel Norð*
*Mynd: Kirsten Ellebæk*



# Kappingin um suðuroyingar harðnar

**Skipafelagið umhugsar nú at fara undir sigling beinleiðis úr Suðuroynni niður til Scrabster, mánakvøld**

ÚTFLUTNINGUR AV FESKUM FISKI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Nú er verður arbeitt við at lata Ernir sigla beinleiðis ímillum Suðuroy og Scrabster mánakvøld. Higartil hava suðuroyingar onga beinleiðis fráferð havt niður á marknaðin mitt í vikuni, men nú er líkt til, at teir fáa heilar tvær fraferðir at velja ímillum*

Kappingin um suðuroyingar harðnar alsamt.

Í hvussu so er á flutningsøkinum.

Nú er Skipafelagið eisini farið at hugsa um suðuroyingar mánakvøld.

Suðuroyingar hava mangan gramt seg um trupulleikarnar at flyta feskar fiskavørur beinleiðis úr Suðuroynni, niður á meginlandið í Evropa.

Men nú ætlar Skipafelagið at fara undir sigling beinleiðis ímillum Suðuroynna og Scrabster í Skotlandi mánakvøld.

Herfyri skrivaðu vit annars um faramskipið Bjørgvin, sum fer undir beinleiðis sigling ímillum Suðuroynna og Skotland tvær ferðir um vikuna.

Bjørgvin skal sigla beinleiðis úr Suðuroynni týsnátt heilt tíðliga týsmorgun og so aftur seint fríggjakvøld. Fyrsti túrurin verður nú fríggjakvøldið.

Men nú sær sostatt út til, at fiskavirkini í Suðuroy fáa ein flutningsmøguleika afturat mánakvøld, tí nú ætlar Skipafelagið at lata Ernir sigla beinleiðis úr Suðuroynni til Skotlands.

### Sigla har farmur er

Árni Joensen á Skipafelagnum sigur, at tað er ikki heilt endaliga avgjørt um Suðuroyggin verður síðsta havn hjá Ernir úr Føroyum mánakvøld.

Men tað skilst tað er hetta, sum liggur í kortunum.

Men hann vissar um, at hetta hevur onki við ætlanina um at lata Bjørgvin sigla.

– Nú Norrøna gavst at sigla mánakvøld, tók ein tørvur seg upp og tann møguleikan ætla vit at taka. Men um Suðuroyggin verður síðsta havn, er ikki heilt endaliga avgjørt.

– Tað veldst um, hvussu nógvir farmur verður at flyta. Vit fara, har sum farmur er, sigur Árni Joensen.

Hann skoytir uppí, at tað er eitt ógvuliga sterkt ynski frá fiskavirkjum í Suðuroy, at Skipafelagið tekur beinleiðis sigling ímillum Suðuroy og meginlandið í Evropa upp, tí teir eru ikki nøgdir við støðuna sum hon er.

Men tað veldst eisini um ferðaætlanina hjá Smyrli, sigur hann.

– Liggur ferðaætlanin hjá Smyrli soleiðis, at tað ikki hóskar saman við siglingini hjá farmaskipinum, mugu vit fara eftir farminum sjálvir.

### Lagar seg til umstøðurnar

Tá ið uppskot var frammi í Løgtingi um flutningsstuðul í 1999, vóru umboð fyri Skipafelagið í vinnunevndini.

Tá ivaðust umboðini fyri Skipafelagið í, um tað er rætt, at lata flutningsstuðul, soleiðis at Skipafelagið missir tann kappingarfyrimun, tað hevur av at sigla bygd úr bygd.

Ein spurningur hjá Skipafelagnum var, hví teir skulu fara út á plássini, um stuðul verður givin til at flyta fiskin til Havnar.

– Hetta er sjálvsagt. Men fyri tað er ikki sagt, at vit eru fyri ella ímóti flutningsstuðli. Men verða tiltøk ella inntriv sett í verk av onkrum slagi, ávirkar tað onkustaðni og tað mugu vit lagað okkum til. Tað gera vit eisini í sambandi við flutningsstuðulin, sigur Árni Joensen.

– Men ein fráferð hjá Smyrli úr Suðuroy til Havnar, sum passaði betri til farmaskipini, hevði loyst nógvar trupulleikar í sambandi við møguleikarnar hjá suðuroyingum at sleppa av við feskar fiskavørur.

– Hinvegin er tað ómøguligt at hava allar bygdir sum síðstu havn, so onkustaðni má farmurin savnast. Men hóast flutningsstuðul verður latin, kann tað vera eitt endamál at sigla til Suðuroyar kortini, tí tað er ikki vist, at ferðaætlanin hjá Smyrli liggur so, at tað passar saman við okkara farmaskipum og tí er spurningurin ikki so einfaldur, sigur stjórin í Skipafelagnum.

# Útflutningurin av føroyskum laksi er næstan steðgaður

**– Skelkurin hjá brúkarum kring um í Evropa er langt ífrá hæsaður av eftir tíðindini um eiturevni í alilaks. Samstundis er prísurin nógv lækkaður. Tó eru smá tekin til at gongdin fer at venda**

ÚTFLUTNINGUR AV LAKSI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Tíðindi um eiturevni í laksi, hava framvegis ógvuliga stóra ávirkan á marknaðin, tí fólk eru ikki farin at keypa laks aftur enn. Sostatt hæsaði skelkurin hjá brúkarunum ikki so skjótt av, sum útflytarar høvdu vónað*

Útflutningurin av føroyskum alilaksi er næstan heilt hildin uppat.

Tað sigur Finn Rasmussen í Landshandlinum, sum selir nógvan laks og sum alla tíðina hevur fingurin á pulsinum á marknaðinum.

Sostatt kann staðfestast, at tíðindini um eiturevni í alilaksi hava nitið ógvuliga fast hjá brúkarunum kring um í Evropa.

Tá ið tíðindini um eiturevni í alilaksi bórust fyri næstan trimum vikum síðani, fór laksamarknaðurin í botn frá einum degi til annan og fólk hildu at kalla uppat at eta laks.

Tíðindini fóru sum eldur um allan heimin og í Evropa gjørdu bæði sjónvarp, útvarp og bløð nógv burturúr.

Og reaktiónin hjá brúkarunum koma eisini alt fyri eitt og sølan av alilaksi helt púra uppat nógva staðni.

Tá vónaðu útflytarar, at hetta var bara eitt upplop og at óttin fyri at eta alilaks fór at hæsa av.

Síðani hava teir fylgt spentir við marknaðinum í teimum ymsu londunum kring um í Evropa.

### Sum vit stúrdu fyri

Finn Rasmussen sigur, at gongdin hevur verið sum hann stúrdi fyri.

Og tað, hann stúrdi fyri, var, at tað fór at vera eitt ógvuliga møtimikið tiltak at fáa fólk at eta laks aftur eftir at kanningin varð gjørd.

– Síðani hendan matvørugølan hevur tikið seg upp, hevur tað verið at kalla ómøguligt at selt laks.

Hann sigur, at tað hjálpir ivaleyst upp á støðuna at føroyskir myndugleikar sendu eina formliga fráboðan út um føroyskan laks.

– Hendan fráboðanin hevur eisini fingið fitt av umrøðu í fjølmiðlunum.

Men fyribils sær tíverri ikki út til, at óttin fyri at eta alilaks bara var eitt upplop. Útflytarar mugu nevniliga enn ásanna, at gongd er ikki komin á aftur søluna av laksi enn.

Verri enn so.

### Men hon kom bara alt ov seint

Finn Rasmussen heldur, at fráboðanin úr Føroyum skuldi komið beinanvegin, ímeðan tíðindini enn vóru ovast á breddanum kring um í Evropa. Men tað gekk ein heil vika til hon kom og tá var gassið farið av og tá sat óttin fyri at eta laks longu so fastur, at hitt beit ikki reiðiliga á.

Sosatt er tað ivingarsamt um fráboðanin úr Føroyum hevur gjørt ta stóru ávirkanina á vanliga brúkaran.

Annars sendi landshandilin sjálvur sínar egnu fráboðanir út og tað tilfarið hava millumhandlarar kring um í Evropa brúkt.

### Ávísir glottar

Finn Rasmussen sigur, at fyri føroyskan útflutning av alilaksi var tað tvífalt óheppið, at tað varð basunerað út um allan heim, at tað eru so nógv eiturevni í alilaksi.

– Prísurin á alilaksi var á veg uppeftir aftur. Men tá ið kanningin varð almannakunngjørd og fólk hildu uppat at keypa laks, fall prísurin aftur munandi. Og nú er prísurin einar tríggjar krónur lægri til alaran enn hann var, beint áðrenn kanningin varð kunngjørd.

– Í løtuni fær alarin ikki meiri enn 16-17 krónur fyri kilo áðrenn slakt. Áðrenn gølan tók seg upp, var prísurin einar tríggjar krónur hægri og tað hevur ógvuliga nógv at siga hjá eini vinnu, sum er á markinum.

– Sostatt hevur kanningin havt sera stóra ávirkan og hon hevur avgjørt verið steinur oman á byrðu hjá teirri hart trongdu alivinnuni í Føroyum.

Prísfallið hevur eisini gjørt sítt til, at so at siga ongin laksur verður sendur á marknaðin, tí tað er nyttuleyst.

Í gjármorgunin ringdi hann runt á ymsar marknaðir fyri at skatta dýpið.

– Og tað, sum sagt verður á marknaðinum í Spania, Fraklandi og aðrastaðni í Suðurevropa, er, at nú tykist sum um at ein pikkalítil glotti er fyri framman og at sølan av laksi er kvinkað eitt lítið sindur upp eftir aftur, og at gongd er við at koma í aftur.

Men framvegis er sølan bara ein viðfáningur av tí, hon hevur verið.

Kortini leggur Finn Rasmussen dent á, at vit skulu heldur ikki gloyma, at vanliga verður ikki nógvur laksur keyptur fyrst í árinum, so tað ávirkar eisini støðuna.

Tì vónar hann, at tað kemur at meiri gongd á aftur, sum tað líður eitt sindur út á árið.